UTTAN ÚR HEIMI

# Flóðaldan skapti frið



*Nógv fólk í Aceh liðu neyð aftan á flóðalduna. Her eru amerikanskir hermenn komnir við neyðhjálp*

*Mynd: Reuters*

**Flóðaldan annan jóladag fekk indonesisku stjórnina og uppreistrarherin í Aceh til samráðingarborðið, og nú er tann seinasti indonesiski hermaðurin farin haðani**

INDONESIA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ongastaðni var skaðin av flóðalduni annan jóladag í fjør so stórur sum í indonesiska landspartinum Aceh. Myndugleikarnir siga, at minst 160.000 fólk doyðu har, men aðrar keldur vilja vera við, at talið var uppaftur størri.

Tann ovurstóra oyðileggingin fekk stjórnarherin og uppreistrarfelagsskapin GAM at semjast um at binda frið, so neyðhjálpin kundi koma vegin fram. Undir samráðingunum samdust partarnir eisini um at sleppa nøkrum av sínum krøvum, og so var vegurin ruddaður fyri veruligum samráðingum um varandi frið.

Hesar samráðingar hava gingið nógv betur, at sjálvt tey mest bjartskygdu høvdu væntað, skrivar AP, og í august skrivaðu partarnir undir ein friðarsáttmála. Í gjár bleiv so kunngjørt, at nú hevur stjórnarherurin tikið allar sínar hermenn úr Aceh. Í hesum sambandi varð skipað fyri einum hátíðarhaldi, har millum annað leiðarin í GAM, Irwandi Yusuf, var hjástaddur. Sambært semjuni skal eitt altjóða eygleiðaralið hava eftirlit við, at semjan verður hildin, og leiðarin hjá eygleiðarunum, Pieter Feith, var eisini við til hátíðarhaldið í gjár.

Nú teir umleið 24.000 indonesisku hermenninir eru farnir úr Aceh, skulu teir lokalu myndugleikarnir manna ein nýggjan her og nýggja løgreglu. Í hesum herinum eru 14.000 mans, og løgreglumenninir verða 9.000 í tali.

# Putin funnið sín eftirmann

**Tað verður eftir øllum at døma ein 40 ára gamal løgfrøðingur, sum skal taka við sum russiskur forseti, tá Vladimir Putin noyðist frá**

RUSSLAND
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Russiska grundlógin ger, at Vladimir Putin kann ikki stilla upp á forsetavalinum í 2008, tí tá hevur hann sitið tey bæði skeiðini, sum grundlógin heimilar.

Tað var tí væntandi, at hann fór at leita sær eftir einum eftirmanni, og tey vóru fleiri, sum fingu varhugan av, at hann longu hevði funnið hann, tá Putin fyri einum mánað síðani tilnevndi tann 40 ára gamla Dmitrij Medvedjev varaforsætisráðharra. Hann hevði verið starvsfólkaleiðari í Kreml frammanundan.

Eygleiðarar í Moskva halda, at endamálið við at tilnevna Medvedjev varaforsætisráðharra er at geva honum tíð til at seta seg inn í tann partin av teirri politisku skipanini, samstundis sum hann skal fáa stundir til at vísa, hvør hann er. Tað fer neyvan heldur at standa á, tí umframt varaforsætisráðharrastarvið er hann vorðin formaður í einum stórum íleggingargrunni, og tað starvið fer at geva honum høvi til at játta pengar á ein hátt, sum kann gera hann væl umtóktan í góðari tíð undan valinum í 2008.

Í Moskva verður sagt, at eydnast tað Medvedjev at sannføra Putin um síni evni, er lítið at ivast í, at hann verður tilnevndur forsætisráðharri um eini tvey ár, og tá er vegurin til forsetaembætið ikki so langur.

Tann 40 ára gamli Medvedjev er útbúgvin løgfrøðingur, og hann fekk útbúgvingina á lærda háskúlanum í Sankta Pætursborg, har Putin sjálvur eisini gekk í sínari tíð. Fyri fimm árum síðani bleiv Medvedjev boðsendur at koma til Moskva, har hann hevði ein virknan lut í forsetavalstríðnum hjá Putin. Tað eru bara tey fægstu, sum kenna hansara politisku hugsjónir, men tað verður sagt um hann, at hann er rættiliga óheftur í so máta.

## Sviar í Grønlandi við jólaposti

Á hvørjum ári skulu tey, sum arbeiða á teimum donsku veðurstøðunum í Grønlandi, hava jólapost, og vanliga eru tað flogfør hjá danska flogvápninum, sum flúgva hagar við pakkunum og ymsari útgerð.

Men soleiðis var ikki í ár, tí hesaferð var tað eitt flogfar hjá svenska flogvápninum, sum var í Danmarkshavn, Mestersvig og Danneborg við tí, sum starvsfólkini har skuldu hava til jóla. Sambært DMI var flogfarið í ella rættari sagt uppi yvir Danmarkshavn tann 14. desember, og har slepti tað pakkunum niður í fallskíggja. Talan var um jólagávur, mat, frukt og sjálvandi eisini eitt jólatræ.

Um fruktin fer at halda sær, er ein annar spurningur, tí DMI sigur, at tað næsta flogfarið fer ikki til Danmarkshavn fyrr enn tann 8. februar.



*Hesaferð mátti eitt svenskt flogfar flyta donsku veðurstøðunum í Grønlandi jólagavur og annað til jóla*

## Gjørdi seg inn á 58 gentur

Løgreglan í svenska býnum Malmø hevur skuldsett ein 30 ára gamlan mann fyri at hava gjørt seg inn á 38 gentur í aldrinum 12 til 18 ár, men løgreglan hevur boðað frá, at maðurin verður skuldsettur fyri líknandi 20 brot afturat.

Sambært Aftonbladet setti maðurin seg í samband við tærungugenturnar í gjøgnum alnótina. Hann brúkti ikki sítt egna navn, men kallaði seg ”Alexandra”. Hann dugdi sera væl at samskifta við genturnar, og tað endaði oftast við, at genturnar játtaðu at hitta hann á einum gistingarhúsi ella heima hjá honum. Men tað vísti seg, at maðurin vildi ikki bara sleppa at tosa við genturnar. Hann bjóðaði teimum pengar aftur fyri at sleppa at taka myndir av teimum, og fleiri søgdu ja. Men hann fór eisini longri, og sambært myndugleikunum endaði tað í minst 58 førum við, at maðurin gjørdi seg kynsliga inn á genturnar.

Sambært ákæruritinum funnu løgreglumenninir heilar 15.000 myndir av ungum gentum heima hjá manninum, og á teldu hansara fann løgreglan nøvnini á umleið 150 gentum.

## Rowling stúrir fyri endanum

J. K. Rowling, sum hevur skrivað tær kendu bøkurnar um Harry Potter, hevur boðað frá, at tíðliga næsta ár fer hon undir ta sjeyndu og seinastu bókina í røðini, men tað verður ikki lætt, sigur hon.

- Eg dugi ikki at ímynda mær eitt lív uttan Harry, sigur J. K. Rowling á sínari egnu heimasíðu. Har avdúkar hon, at hon hevur havt stórar trupulleikar við summum av Potter-bókunum, og at í tí eina førinum mundi bókin tikið lívið av henni, soleiðis sum hon sjálv orðar tað.

Tann sætta bókin um Harry Potter kom út í juli, eftir at Rowling hevði arbeitt við henni í næstan tvey ár. Eins og hinar Harry Potter-bókini hevur tann seinasta gingið sum heitt breyð, og sambært BBC hevur høvundurin selt meiri enn umleið 300 milliónir bøkur um Harry Potter.



*J. K. Rowling stúrir fyri at fara undir ta seinastu bókina um Harry Potter*